## DAGSINS MEINING

# En stór høgtíð

Páskir eru størsta hátíðin hjá kristna heiminum. Á páskum taka børn og foreldur upp tann fyrndargamla sið at rulla páskaregg. Páskareggið er ímyndin upp á várið, ið kemur eftir vetur við nýggjum lívi og nýggjum vónum. Eggið er eisini ímyndin uppá kristindómin. Skalið, ið er hart ímyndar grøvina, meðan tað, sum er innan ímyndar lív og vón við Kristi føðing, deyða og uppreisn. Á páskum reis heimsins frelsari frá deyðum og harvið birtist ein livandi vón fyri alla mannaættina.Vit eiga tí at nýta hesar komandi dagarnar til at umhugsa okkara støðu og einhvør má spyrja seg sjálvan, hvussu hann hevur tað við øllum teimum stóru spurningum, sum páskirnar seta tí einstøku menniskjuni.

Hendingarnar í Jerusalem fyri meira enn tvey túsund árum síðani fóru fram í eini ófriðaligari tíð. So kunnu vit spyrja, um nakað er broytt í hesum parti av heiminum. Svarið er tíverri neiligt. Alt Miðeystur ber enn sum áður dám av ófriði, klandri og stríði. Miðeystur er av nógvum ymiskum orsøkum støðugt í brennideplinum hjá stórveldunum. Afturat hesum koma átrúnaðarligar ósemjur og yvirgangur oftast stavandi frá átrúnaðarligari fanatismu. Fundamentalisman er ein hin mest vanliga orsøkin til yvirgangsvirksemið í økinum. Men eisini hesi fyribrigdi hava sínar orsøkir og sínar røtur. Í Miðeystri er ein heil tjóð uttan egið føðiland. Eitt heilt ættarlið er borið í heim og uppvaksið í flóttafólkalegum sum annan floks menniskju. Hesi menniskju kenna seg svikin og sleppt uppá fjall. Tey liva í fátækdømi uttan nakra vón um eitt betri lív. Undir slíkum umstøðum eru ungfólk mestsum verjuleys offur fyri eirindarleysar leiðarar í fundamentalistiskum yvirgangsfelagskapum. Skal veruligur og varandi friður vinnast í eitt nú Palestina, so mugu trupulleikarnir loysast frá botni av. Ísrael má viðra ST samtyktirnar, palestinska stjórnin má basa yvirganginum og eitthvørt munagott má gerast við fátækdømið.

Her við størstu kristnu høgtíðini fyri framman er bert at vóna, at heimsins leiðarar bera seg at sum kristin fólk og viðurkenna, at palestinar eisini eru menniskju við somu mannarættindum sum onnur. Vit kunnu bert vóna, at tað eydnast at beina yvirgangin burtur og at fundamentalisman missir vindin úr seglunum. Fundamentalisman er ikki bert í Miðeystri. Hon er allastaðir og í ein ávísan mun er hon eisini her hjá okkum. Væntandi tollyndi og virðing fyri teimum, ið hugsa øðrvísi ella sum eru øðrvísið kemur meira enn so fyri í Føroyum. Vit kunnu øll hóskandi nýta páskadagarnar til at hugsa um hesar álvarsomu spurningar. Vit ynskja øllum Føroya fólki einar gleðiligar páskir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kantinur til skúlabørn



**Bill Justinussen**
*løgtingsmaður*

Tað var gott, at útvarpið á døgverða týsdagin enn einaferð tók matarviðurskiftini í fólkaskúlanum upp viðgerðar. Sagt varð, at um Arbeiðseftirlitið varð spurt, hevði tað ikki góðtikið matarumstøðurnar hjá skúlabørnum okkara. Eisini 5'arin seinasta mikudag um sama evni var sera viðkomandi.

### Skúlin arbeiðspláss

Nú eru 2 1/2 ár síðani, at landsstýrið setti sær fyri at seta fólkaheilsuna á føroysku politisku dagsskránna. Sum landsstýrismaður á økinum var tað mær sera greitt, at neyðugt var við nýggjum raðfestingum á fólkaheilsuøkinum og serliga við atliti til skúlabørnini. Og skjótt varð staðfest, at teirra viðurskifti til eitt heilsugott og mennandi umhvørvi á skúlunum eru alt annað enn góð. Løgið at hugsa sær, at vit vaksnu hava so serliga stóra umsorgan fyri, at vit á okkara arbeiðsplássum hava allar neyðugar hentleikar til matarsteðgir, meðan børnini fullkomiliga eru gloymd. Tey sita enn sum eg sjálvur sat fyri 30 árum síðani og eta ost, livradeiggj, kjøt og sjokuláta-viðskera á sama borði, har rokni-, skrivi- og lesibøkurnar liggja. Mjólkin ella saftin eru flógv, tí mangastaðni hevur kommunan ikki hildið seg havt umstøður til at gera íløgur í kuldaskáp. Vegir og havnir hava størri týdning. Høvdu vit vaksnu funnið okkum í at drukkið kaffi og eti matpakka, meðan vit sótu frammanfyri telduskíggjan á skrivstovuni ella meðan vit stóðu við flakaskeriborðið? Skúlin er eitt arbeiðspláss fyri okkara børn, og hetta eiga vit vaksnu at virða.

### Krøv mugu lógarfestast

Hugburðurin er ikki nevnivert broyttur. Enn sum áður verða skúlar bygdir og teknaðir, uttan at matarumstøðurnar verða íroknaðar. Málið um kantinurnar kann samanberast við dýrar íløgu í ein flottan, dýran BMW, men fyri at spara eitt sindur, velja vit ikki at koyra so nógv við honum, so bensinútreiðslurnar verða hildnar niðri. Vit gera stórar íløgur í fólkaskúlan alla tíðina - kommunur og land - fyri at tryggja ungdómi okkara bestu útbúgvingarmøguleikar. Flottar bygningar, dýrir arkitektar, dýrir arbeiðsbólkar, sum ráðleggja um undirvísingartilfar, inniluft, hølisinnrættan, útsýni og hvat veit eg. Men í trivnaðin gera vit ikki íløgur. Bensinið, sum skal fáa bilin at koyra. Hvat nyttar við góðum rammum, vælútbúnum lærarum, góðum útsýni og inniluft, um næmingurin er svangur og illa tilpassar? Um hann ikki trívist? Hvat nyttar at tala fyri deyvum oyrum? Tá hugburðurin ikki broytist av øllum tí, sum er frammi í tíðini, er bert eitt at gera: at krevja við lóg, at allir skúlar skulu hava kantinur.

Nógv børn orka ikki at eta tíðliga á morgni. Tey fara heiman kl. 07.30 og eru heima aftur kl. 14.30. Altso eru tey burtur ein heilan arbeiðsdag uttan at hava havt møguleika til matnáðir. Hvussu kunnu tey vera væl fyri? Er tað stimbrandi fyri teirra skúlahug, sum annars ikki man vera tann besti hjá nógvum teirra? Ein kantina er eitt andarhald, eitt sosialt frístað, har tú eisini sum barn kanst kobla úr eina løtu. Har gerast børnini bæði kropsliga og andaliga betri fyri at taka móti undirvísing. Og nógvar aðrar góðar grundgevingar finnast.

### Landsstýrið

Í undanfarna landsstýri var eitt samstarv millum heilsuverkið og skúlaverkið byrjað á ovastu rók. Kantinurnar vóru eitt mál. Frukt, mjólk, djús, kalt vatn og heitur matur eitt annað. Ein nýggj lærugrein við innihaldinum lívsstílur, heilsa, rørsla, matvanar v.m. eitt annað. Eisini gjørdu vit eitt lógaruppskot um ein landsskúlalækna fyri øll skúlabørn. Hann skuldi vera ein týðandi faklig drívmegi í fólkaheilsuarbeiðnum viðvíkjandi skúlabørnum. Men hendan samgongan vil ikki vita av tí uppskotinum. Hon dugir helst ikki at síggja "perspektivini" við hesi skipan. Heldur vil landsstýrismaðurin við einum alternativum uppskoti leggja alla ábyrgdina á kommunulæknaskipanina, sum frammanundan er ein søkkandi skúta.

Tíverri náddi undanfarna samgonga ikki á mál við fólkaheilsupolitikkinum, tí túrurin varð avbrotin av klandri, sum øll vita um. Núsitandi samgonga hevur lovað okkum ein fólkaheilsupakka á Ólavsøku. Eg gleði meg og vóni tað besta fyri okkara skúlabørn.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.